

*Jan Müller saman við familjuni*

*Eyðun Elttør, landsstýrismaður við oljumálum, kom eisini umborð á Platformin*



# Blaðstjórin var ovfarin

**Fleiri hundrað fólk vóru til móttøkuna hjá ábyrgdarblaðstjóranum á Sosialunum, og Jan Müller segði seg vera tiknan á bóli av hesum**

MÓTTØKA
*Eyðun Klakstein*

Fríggjadagin í farnu viku hevði Jan Müller móttøku, nú tað vóru liðin 25 ár, síðani hann kom í starv á Sosialinum.

Ábyrgdarblaðstjórin, sum hevur stýrt blaðnum í 20 ár, bjóðaði inn á Platform, og tað vóru nógv, sum tóku av. So nógv, at blaðstjórin var ovfarin av nógva fólkinum, sum vildi heilsa upp á hann.

Hann vóru fólk av øllum slagi – familja, vinir, arbeiðsfelagar, politikarar, vinnulívsfólk og onnur.

**Brøv til leiðarar**

Onkur nýttu eisini høvi at halda røðu, og ein av teimum var blaðstjórin á Sosialinum, Eirikur Lindenskov.

Hann lýsti millum annað framfýsni hjá Jan Müller.

– Tá Føroyar spældu fótbólt móti Týsklandi, setti hann seg í samband við sjálvan Gerhard Schröder – vildi hava hann at kommentera dystin – og nú Nelson Mandela fylti runt, fekk hann eisini eina heilsan frá Sosialinum. Millum alt annað á borðinum hjá Jan liggja tvey brøv: Annað frá Gerhardi Schröder og hitt frá Nelson Mandela, sigið so tað!

– Eg veit, at Jan ikki er komin á mál enn. Hann ætlar sær ikki at gevast, og vit vilja heldur ikki hava hann at gevast. Tað kundi líka verið, um Eyðun Elltør legði frá sær, segði Eirikur Lindenskov skemtandi.



*Sjónvarpsmaðurin Johnsigurd Johannesen og teknarin Óli Petersen práta*



*Flemming Samuelsen heilsar upp á Jan Müller*



*Starvsfólk á Sosialinum: Jákup Mørk, Ingi Rasmussen, Jonhard Hammer og Eirikur Lindenskov*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Farmakonomar fingu prógv



*Farmakonomar sum fingu prógv í summar 2003, f.v. Laila Haraldsen, Fríðunn Jacobsen og Jóna Miné Thomsen. Annika Hansen vantar á myndini.*

Í summar 2003 fingu tríggir farmakonomar prógv á Tjaldurs Apotek í Havn og ein á Suðuroyar Apotek.

Útbúgvingin sum farmakonomur tekur trý ár. Ein partur av útbúgvingini er á apotekunum í Føroyum, meðan skúlin er í Hillerød í Danmark, har næmingarnir eru sjey ferðir í tey trý árini, útbúgvingin tekur.

Tær sum fingu prógv sum farmakonomar vóru Laila Haraldsen á Argjum (Tjaldurs Apotek), Fríðunn Jacobsen í Havn (Tjaldurs Apotek), Jóna Miné Thomsen í Havn (Tjaldurs Apotek), og Annika Hansen á Tvøroyri (Suðuroyar Apotek).

### Sunleiv Højgaard 45 ár



31.august 2003 fylti Hans Sunleiv Sigurdson Højgaard 45 ár, hann er sonur Sigurd Paula, ið er ættaður úr Rituvík og Jolinu Højgaard, ið er ættað úr Norðragøtu.

16. juli 1988 giftist hann við Annu, ið er dóttir Martin og Dinnu Eliasen í Fuglafirði.

Í 1982 fekk hann prógv sum timburmaður, og í 1987 bygdi hann sær hús í Runavík.

Hann eigur tvær døtur, sum eita Linda og Silvia Maria Højgaard, og tvær abbadøtur sum eita Irena og Vár Mid-jord, tær búgva í Fuglafirði.

Dagliga starvast Sunleiv sum formaður í Føroya Postfelag, har hann hevur verið í fýra ár. Postmaður hevur hann nú verið í 22 ár, og brandmeistari í 1 ár.

Til síðsta løgtingsval stillaði hann upp sum umboð fyri Javnaðarflokkin, men ikki hesaferð slapp hann inn um tær trongu dyrnar í føroyskum politikki, men vónandi er hann til dystin fús næsta val, hann hevði uttan iva gjørt eitt gott arbeiði.

Við øllum hesum um oyrini skuldi man kanska hildi, at tað ikki var nógv tíð til yvurs, men so er ikki.

Tann tíð hann hevur til yvurs fer heilhjartað til familju og vinir. Er tað nakar sum manglar eina hjálpandi hond, so er hann har, og alt hann ger er av fullum hjarta.

Við hesum fáu orðum vilja vit ynskja pápa okkara hjartaliga tillukku við 45 ára degnum og takk fyri farnu og komandi árini.

*Heilsan Linda*
*og Silvia Maria*

### Mia Jacobsen 90 ár



Mikudagin 3. september fyllir Anna Maria Jacobsen, Mia á Heyggi, á Selatrað 90 ár. Foreldrini hjá Miu vóru, Emilie og Karl Petersen, á Trøðni, á Selatrað.

Í 1937 giftist hon við Mathias Jacobsen (1904-1980), hann var sonur Suffíu og Mathias Jacobsen, á Heyggi á Selatrað.

Mathias var sjómaður í nógv ár, hann róði eisini út í Grønlandi. Síðstu nógvu árini var hann á landi og arbeiddi sum timburmaður, og hevði hann tað mesta av landinum sum sítt arbeiðsøki. Ein av teimum góðu gomlu timburmonnunum.

Mia hevur síðan tey giftust passað hús, mann og børn. Eitt skifti vaskaði hon í skúlanum á Selatrað, til skúlin bleiv niðurlagdur í 1969.

Mia og Mathias fingu 9 børn, tey eru: Diana, Lena, Ásbjørn, Tórur, Tróndur, Grímur, Mia, Dávur og Kári.

Børnini búgva ymsastaðni kring landið, og eitt býr í Í slandi og eitt í Norra.

Mia eigur 28 ommubørn og 25 langommubørn.

Hóast Mia hevur havt mótgongd og síðstu árini verið illa gongd, og ikki kunna gingið og runnið sum mong onnur, hevur hon tó ongantíð mist álitið á sín Harra og frelsara, sum hon tók ímóti sum ung, og hon veit, at hon einaferð skal møta Mathiasi aftur heima í himli.

Hjartaliga tillukku við degnum.

**x**

### Til pápa mín, Dagbjart Johansen



Mín elskaði pápi, nær síggi eg teg aftur?
Tann, sum eg havi hugt upp til,
og gav ta stóru gleði frá sær.
Sálarliga, hevði ta størstu gleði,
men likamliga, ta ringastu pínu.
Tú hevði tað smílið, sum kundi bjarga einum degi
og gav ta troyst frá tær,
sum styrkti og helt einum uppi.
Tá tíðin var ring og tung,
hevði tú títt stóra hjarta
og góða mót,
sum helt áfram við at síggja fram til ein ljósari dag.
Á, tann undurfuli dagur verður at møta tær aftur,
í tí Himmalska stað.
Takk fyri tey ríku minni, ið tú gav mær.
Vit elska teg. Hvíl í friði.

**Elin Dagbjartsdóttir**

### Dagurin

**3. september. Seraphia.** Kristin trælkvinna úr Sýriulandi, sum varð hálshøgd fyri trúar sakir.